# Landsroyndin 2015

## Frágreiðing um mál, ávegis mál, uppgávur og úrslit

**Altjóða treytir fyri góðum royndarhaldi**

**Sjálvseftirmeting(Selvevaluering)**
T.v.s. Nœmingurin fær úrslitið av avriki sínum at vita, beint tá hann hevur latið inn avrikið.

**Afturboðan(Feed-back)**
Lærarin hevur møguleika at geva skrivliga viðmerking til næmingin viðvíkjandi svarinum á einstaku uppgávuni.

**Ferð**
Úrslitini av avrikunum eru tøk hjá næmingi, foreldrum, lærara og leiðslu beinanvegin.

Mentamálaráðið
Juni 2015

# Landsroyndin 2015

## Almennar viðmerkingar
Sambært § 14, stk. 5 í løgtingslóg um fólkaskúlan skipar landsstýrismaðurin, eftir nærri ásettum reglum, fyri landsroynd í føroyskum, støddfrøði og náttúru/tøkni á 4. og 6. floks stigi. Landsroyndirnar skulu vera ein liður í arbeiði skúlans at eftirmeta undirvísingina. Í lógini er eisini ásett, at foreldrini skulu verða kunnað um úrslitini av lands- og støðuroyndum.

## Endamál
Endamálið við landsroyndunum er at tryggja skúlum, foreldrum, næmingum, lærarum og myndugleikum innlit í fakliga støðið í fólkaskúlanum, og at geva lærarum og skúlaleiðslu eitt amboð, sum, umframt at meta um fakliga støðið hjá næmingunum, eisini skal nýtast til at laga undirvísingina til tørv og fortreytir hjá tí einstaka næminginum. Eisini er málið við landsroyndunum at styrkja eftirmetingarskipanina í skúlunum.

Landsroyndirnar verða skipaðar í samsvari við málini í einstøku lærugreinunum og eru tí ætlaðar sum amboð og ítøkiligt grundarlag hjá myndugleikum, skúlum og foreldrum at fylgja við og meta um fakliga støðið hjá næmingum og flokkum í mun til ásettu málini í námsætlanini. Harumframt er hetta eitt amboð at kunna viðgera úrslitið í einstøku skúlunum í mun til miðalúrslitið fyri landið.

## Eftirmeting av landsroyndini 2015
Skúlaleiðarin skal saman við lærarunum í einstøku lærugreinunum og viðkomandi flokslærara viðgera úrslitini frá landsroyndini og leggja eina ætlan fyri, hvussu neyðugar ábøtur skulu fremjast, og hvussu víðari verður arbeitt við at menna undirvísingina í lærugreinunum.

Skúlaleiðarin skal í seinasta lagi 3 mánaðir eftir, at skúlin hevur fingið úrslitini, senda Mentamálaráðnum eina frágreiðing um, hvørji tiltøk og ætlanir úrslitini hava elvt til. Skúlarnir fingu atgongd til úrslitini í skrivligu landsroyndini sama dag, sum royndin var hildin. Skúlaleiðarin skal við atliti at úrslitunum í landsroyndini í seinasta lagi 1. sept. 2015 senda Mentamálaráðnum eina frágreiðing um, hvørji tiltøk og ætlanir, skúlin hevur sett í verk.

## Um landsroyndina 2015
Í ár er tað sjeyndu ferð, at skipað var fyri landsroynd í 4. og 6. flokki í fólkaskúlanum. Fyrsta landsroyndin var í 2008. Royndirnar í 2015 vóru skipaðar eftir øðrvísi leisti enn árini frammanundan, harumframt vóru dagføringar og tillagingar gjørdar í fakliga innihaldinum í uppgávunum. Royndin í ár var teldutøk, og vóru uppgávurnar til landsroyndina gjørdar til eina teldutøka skipan. Hetta førdi millum annað við sær, at næmingar við skerdum lesiførleika, kundu fáa allar uppgávur og alt tilfar lisið upp, um teir høvdu neyðugu forritini á telduni. Úrslitini frá einstøku royndini vóru tøk beinanvegin, sum næmingurin lat inn avrikið. Næmingur/foreldur

sóu, hvør spurningurin var, og hvussu næmingurin hevði svarað. Lærarin sá svarið hjá einstaka næminginum í flokkinum og kundi tí beinanvegin rokna út floksmiðaltalið í lærugreinini. Seinni sama dag sendi MMR út landsmiðaltalið fyri lærugreinina. Tískil høvdu skúlarnir allar upplýsingar frá royndini tøkar sama dag, sum royndin var hildin. Ein fín skipan, sum fylgir øllum altjóða krøvum um royndarhald og afturboðan. Hesi krøv eru:

**Sjálvseftirmeting (Selvevaluering)**
T.v.s. Næmingurin fær úrslitið av avriki sínum at vita, beint tá hann hevur latið inn avrikið.

**Afturboðan (Feed-back)**
Lærarin hevur møguleika at geva skrivliga viðmerking til næmingin viðvíkjandi svarinum á einstaku uppgávuni.
**Ferð**
Úrslitini av avrikunum eru tøk hjá foreldrum, lærara og leiðslu beinanvegin.

Landsroyndin í 2015 var hildin í døgunum 27. – 29. apríl, og samlaðu royndarúrslitini vóru send skúlunum lítlan mánað seinni. Hetta er álagt við lóg. Men sum nevnt omanfyri, høvdu skúlarnir allar hesar upplýsingar tøkar royndardagin.

Uppgávurnar til landsroyndina eru gjørdar við støði í ávegis málum í námsætlanunum fyri lærugreinirnar føroyskt, støddfrøði og náttúru/tøkni í 4. og 6. flokki. Nýggjar námsætlanir vóru settar í gildi 1. august 2011. Hetta merkir, at nú eru førleikamálini á ymsu floksstigunum samsvarandi orðingunum í nýggju námsætlanunum.

Landsroyndin er ikki longur eitt nýtt fyribrigdi í skúlunum. Næmingarnir í 6. flokki, sum vóru til landsroynd í 2015, hava allir roynt hetta áður í 4. flokki, og hava tí ítøkiligar royndir í at fara til landsroynd.

## Úrslit

Tað er týdningarmikið at leggja dent á, at landsroyndir ikki siga alt um førleikan hjá næmingunum. Royndirnar kunnu tó geva eina ábending um, hvussu støðan er. Úrslitið skal nýtast sum partur av samlaðu eftirmetingini í skúlunum og hjá myndugleikum við atliti at innihaldi, háttalagi o.ø. til tess at betra um undirvísingardygdina og úrtøku næminganna.

Í ár eru øll avrik víst í % av samlaða uppgávusvarinum. Tað vil siga, at um eitt avrik verður víst sum 60%, so eru 60% av svarunum røtt.

Ein samanbering millum úrslit í royndum sum hesari eigur altíð at gerast við størsta fyrivarni. Tað eru ikki somu royndir, næmingarnir taka, tí royndirnar eru tillagaðar øll árini, og torleikastigið er eisini hækkað. Í ár er harumframt tann broyting, at landsroyndirnar eru talgildar og gjørdar á teldu. Nú so nógvar broytingar eru í royndarhaldinum í mun til árini frammanundan, verða samanberingar við árini frammmanundan tí ikki gjørdar í ár. Frágreiðingar frá landsroyndunum árini frammanundan eru at finna á http://www.mmr.fo/arbeidsoki/utbugving-og-gransking/folkaskulin/landsroynd/. Møguliga verða samanberingar gjørdar árini framyvir, nú allar royndir eru teldutøkar. Men tað eru stór ivamál um hesar samanberingar. Uppgávurnar eru ikki styrkimettar, og tað eru ikki somu næmingar, sum hava tikið lut í royndunum, ikki somu lærarar, sum hava havt undirvísingina um hendi, umframt at innihaldið í uppgávunum verða tillagað ár eftir ár.
Greitt verður nú frá málum, uppgávum og úrslitum í einstøku lærugreinunum.

# Royndarúrslit:
# Fyrri partur

Nú verða endamálið fyri ymsu lærugreinina lýst, og ymsu royndarúrslitni løgd fram við einfaldum myndlum av úrslitunum í øllum lærugreinunum. Í seinna parti av hesi frágreiðing verða ymsu uppgávusvarini í hvørjari lærugrein sær gjølligari lýst. Seinni partur er serliga ætlaður skúlaleiðslum, lærarum, skúlastýrislimum og foreldrum, sum hava serligan áhuga og innlit í hesar uppgávur!

## Føroyskt

Endamálið fyri lærugreinina føroyskt.

Undirvísingin í føroyskum hevur til endamáls, at næmingurin:

- mennir sínar lesi- og skriviførleikar umframt síni samskiftisevni
- ognar sær vitan um føroyskar bókmentir, umframt innlit í norðurlendskar og alheims bókmentir
- skapar sær eina heildarfatan av føroyskum máli og málrøkt, bæði í samtíðini og í søguligum høpi
- verður tilvitin um málið sum samskiftisamboð og samskiftismiðil
- verður tilvitin um málsligt fjølbroytni og stíllegur
- mennir góðar og hóskandi arbeiðsvanar, læringarhættir og vandna og kritiska hugsan
- mennir síni skapandi evni
- mennir sín samleika við sjálvsáliti og tryggleika í egnari mentan fyri eyga
- mennir sína virðing og sítt tolsemi fyri øðrum mentanum
- mennir síni vitbornu, kensluligu og felagsligu evni
- fær lagt støði undir lívslanga læring, umhugsni og virkni í samfelagsligum høpi.

---

## Ávegis mál í 4. flokki

**Skrivaða málið**
Næmingurin dugir

- at lesa hart og endurgeva egnan og annans tekst
- at tekna, svara skrivligum spurningum ella á annan hátt vísa, at tað lisna er skilt
- at finna høvuðsinnihaldið í yrkis- og fagurbókmentaligum tekstum
- at skilja høvuðstættirnar í skaldskapi av mannamunni
- at gera skrivligar viðmerkingar til tað, hann hevur sæð, hoyrt ella lisið
- at skriva orð og styttri setningar við skilligari handskrift
- at nýta fjølbroytt orðatilfeingi
- at leita fram tilfar á bókasavni og interneti
- at nýta orðabøkur og handbøkur, bæði prentaðar og teldutøkar
- at brúka rættstavara á teldu, soleiðis at stavað verður rætt
- at nýta teldu sum amboð og leita fram upplýsingar.

**Málkunnleiki**
Næmingurin dugir
- at brúka orðabøkur til at flokka orð í allar orðaflokkar, og at benda navnorð, sagnorð og lýsingarorð
- grundleggjandi orðalagslæru, t.e. grundlið, umsøgn og ávirki
- at seta punktum og komma millum einfaldar setningar.

Í 4. flokki eigur næmingurin at duga so mikið væl at lesa, at hann sjálvur kann lesa lættar bøkur á móðurmálinum, og næmingurin eigur at duga at skriva stuttar fyrisagnir og sjálvstøðugar søgur.

**Skrivaða málið**
Næmingurin dugir
- at skilja og greina ymiskar tekstir við grundleggjandi bókmentafrøðiligum hugtøkum
- at skilja og greina høvuðstættirnar í skaldskapi av mannamunni
- ymiskar lesihættir sum t.d. at snarlesa, nærlesa, punktlesa og vísa, at tað lisna er skilt
- at gera metingar og niðurstøður av tí, hann hevur sæð, hoyrt ella lisið
- at skriva sjálvstøðugt og málsliga rætt við fjølbroyttum orðatilfeingi
- at skriva tekstbrot við skilligari og stinnari handskrift
- at nýta tekstviðgerðarforrit
- at nýta orðabøkur og handbøkur, bæði prentaðar og teldutøkar
- at brúka rættstavara á teldu, so at stavað verður rætt
- at nýta teldu sum amboð og leita fram upplýsingar
- at skriva blindskrift við teldu.

**Samansettir tekstir**
Næmingurin dugir
- at skilja og greina ymiskar samansettar tekstir
- at tosa um ymiskar málsligar stíllegur í sambandi við samansettar tekstir, so sum sms- og kjattmál
- at skapa eina samanhangandi frásøgn við at seta saman orð, ljóð og mynd.

**Málkunnleiki**
Næmingurin dugir
- at brúka orðabøkur til rætta málnýtslu, so sum bendingar og samansetingar av orðum
- orðalagslæru og at greina setningar
- at seta tekn
- at síggja málføramun í føroyskum
- at vísa á kunnleika til norðurlendsku grannamál okkara, serliga norskt og íslendskt, bæði í talu og á skrift.

## Ávegis mál í 6. flokki

### Talaða málið

Næmingurin dugir

- at nýta talumálið klárt og skilliga í t.d. kjaki, samrøðu, framløgu, verkætlan og leiki
- at fata og lýsa samskifti í mun til boðbera, móttakara, miðil og støðu
- at lurta virkin og seta greinandi og metandi spurningar.

**Skrivaða málið**

Nemingurin dugir

- at skilja og greina ymiskar tekstir við grundleggjandi bókmentafrøðiligum hugtøkum
- at skilja og greina høvuðstættirnar í skaldskapi av mannamunni
- ymiskar lesihættir sum t.d. at snarlesa, nærlesa, punktlesa og vísa, at tað lisna er skilt
- at gera metingar og niðurstøður av tí, hann hevur sæð, hoyrt ella lisið
- at skriva sjálvstøðugt og málsliga rætt við fjølbroyttum orðatilfeingi
- at skriva tekstbrot við skilligari og stinnari handskrift
- at nýta tekstviðgerðarforrit
- at nýta orðabøkur og handbøkur, bæði prentaðar og teldutøkar
- at brúka rættstavara á teldu, so at stavað verður rætt
- at nýta teldu sum amboð og leita fram upplýsingar
- at skriva blindskrift við teldu.

**Samansettir tekstir**

Nemingurin dugir

- at skilja og greina ymiskar samansettar tekstir
- at tosa um ymiskar málsligar stíllegur í sambandi við samansettar tekstir, so sum sms- og kjattmál
- at skapa eina samanhangandi frásøgn við at seta saman orð, ljóð og mynd.

**Málkunnleiki**

Nemingurin dugir

- at brúka orðabøkur til rætta málnýtslu, so sum bendingar og samansetingar av orðum
- orðalagslæru og at greina setningar
- at seta tekn
- at síggja málføramun í føroyskum
- at vísa á kunnleika til norðurlendsku grannamál okkara, serliga norskt og íslendskt, bæði í talu og á skrift.

## Uppgávurnar í føroyskum

Landsroyndin í føroyskum í 4. flokki fevndi um fyrisøgn og lesiroynd, *lesa og skilja*. Uppgávan í lesiroyndini var at lesa orð, setningar og styttri søgubrot, og við støði í lisna tekstinum skuldu nemingarnir svara spurningum. Fyrisøgnin var ein innsetingarfyrisøgn. Væntast má, at nemingurin dugir so mikið av málløru, sum neyðugt er til rættskrivingina á hesum stigi.

Landsroyndin í føroyskum í 6. flokki fevndi um eina lesiroynd, eina málløruuppgávu og fyrisøgn. Í lesiroyndini skuldi nemingurin lesa styttri og longri tekstir við tilhoyrandi skrivligum spurningum, sum skuldu svarast. Skrivligi parturin fevndi um eina roynd í málløru og eina innsetingarfyrisøgn.

## 4. flokkur
## Lesa og skilja tekst

Í uppgávusettinum í 4. flokki skuldu næmingarnir svara 56 spurningum, og allir vóru fleirvalspurningar.




Talvan omanfyri vísir, hvussu næmingar hava svarað býtt út á hvørji 10%.
Sum sæst, hava flestu næmingar millum 80-90% rætt og millum 90-100% rætt. Bert heilt fáir næmingar hava minni enn 60% rætt.

## 4. flokkur
## Fyrisøgn
Í 4. flokki var innsetingarfyrisøgn, har næmingarnir skuldu skriva 100 orð.




Talvan omanfyri vísir, hvussu næmingarnir hava svarað býtt út á hvørji 10%.
Sum sæst, hava flestu næmingar millum 70-80% rætt og millum 80-90% rætt. Hetta bendir á, at uppgávurnar eru ikki serliga torførar at loysa, ella at næmingar í ár eru sera dugnaligir.

## 6. flokkur
## Lesa og skilja tekst

Í uppgávusettinum í 6. flokki skuldu næmingarnir svara 58 spurningum, har allir vóru fleirvalspurningar.




Talvan omanfyri vísir, hvussu nógvir næmingar hava svarað býtt út á hvørji 10%. Eisini her eru flestu næmingar, sum hava fingið 50% og meira rætt.

## 6. flokkur

## Fyrisøgn

Fyrisøgnin Í 6. flokki var innsetingarfyrisøgn, har næmingarnir skuldu skriva 148 orð.




Talvan omanfyri vísir, hvussu nógvir næmingar hava svarað býtt út á hvørji 10%. Sum sæst eru fáir næmingar, sum fáa minni enn 50% rætt.

## 6. flokkur
## Mállæra

Í uppgávusettinum í 6. flokki skuldu næmingarnir svara 101 spurningum, har 75 vóru fleirvalsspurningar, og 26 vóru rútar at skriva í.




Talvan omanfyri vísir, hvussu nógvir næmingar hava svarað býtt út á hvørji 10%. Myndin er stórt sæð tann sama sum í undanfarnu myndunum.

# Støddfrøði

Undirvísingin í støddfrøði hevur til endamáls, at næmingurin

- mennir sín støddfrøðiliga førleika so, at hann við fyrimuni kann standa seg í støddfrøðiligum umstøðum sum viðvíkja gerandislívi, samfelagslívi og náttúruviðurskiftum
- ognar sær kunnleika um tann partin av støddfrøðini, sum hevur týdning fyri mentan, vísindi og tøkni
- fær greiða fatan av, at samskifti og samstarv um støddfrøðilig viðurskifti eggja til og eru mennandi fyri skapandi virksemi
- fær greiðu á, hvussu støddfrøðin kann vera við til at fremja fatan, seta orð á og viðgera trupulleikar á ymiskum fakøkjum, umframt geva innlit í støddfrøðiliga umhugsan
- verður tilvitaður um, hvussu støddfrøðin kann verða nýtt, tá ið vit taka ábyrgd og fremja ávirkan í demokratiskum felagsskapi
- betur gerst førur fyri at meta um og taka støðu, tá ið onnur nýta støddfrøðina í sínum virksemi
- fær tann førleika, ið krevst, fyri at hann skal megna at greiða úr hondum eina útbúgving, sum støddfrøðin er partur av.

## Ávegis mál í 4. flokki

### Tøl og algebra

Næmingurin dugir

- at skyna á støðubundnu talskipanini við *einarum, tíggjarum* og *hundrarum*
- at kenna mun á makaðum og støkum tølum og positivum og negativum tølum
- einføld brot og desimaltøl og at runda
- mannagongdir, tá ið tøl við fleiri talteknum verða løgd saman ella drigin frá, bæði í høvdinum og á pappíri
- at nýta lítlutabell og at falda tøl, ið hava fleiri taltekn
- einfalda býting, t.d. við ítøkiligum tilfari og dømum úr gerandisdegnum
- raðfylgjuna á rokniháttunum
- krossskipanina og sambandið millum tøl og tekning
- loysa einfaldar líkningar, sum hava samanlegging, frádrátt og falding í sær
- at nýta lummaroknara at loysa uppgávur úr gerandisdegnum.

### Geometri

Næmingurin dugir

- at greiða frá eyðkennum hjá tríkantum, fýrkantum og sirklum
- at rokna ummál og vídd á tríkantum og fýrkantum
- at vaksa og minka skap í støddarlutfalli
- at spegla og flyta einføld skap og kenna samskap og allíki
- at meta um og máta rúmd og vekt.

### Støddfrøði í brúki

Næmingurin dugir

- at savna og skipa dátur og hagtøl og vísa tey við ritmyndum

- at loysa praktiskar uppgávur um keyp og sølu, umframt einfalda renturokning
- grundleggjandi hugtøk í talgildum rokniarki.

**Samskifti og spurdómar**

Næmingurin dugir

- at lýsa støddfrøðiligar mannagongdir og greiða frá teimum, har ímillum at lýsa egin uppskot til loysnir
- at meta um úrslit
- at arbeiða saman um greiðsluevni, sum hava í sær fleiri loysnir.

### 6. floksstig

**Tøl og algebra**

Næmingurin dugir

- at skyna á støðubundnu talskipanini
- at kenna positiv og negativ tøl umframt makað og støk tøl
- at kenna desimaltøl, t.d. í sambandi við pening og at runda
- at rokna í teimum fýra rokniháttunum, í høvdinum, á pappíri og við lummaroknara
- raðfylgjuna á roknireglunum
- at leggja saman, draga frá og falda brot
- at rokna einfalda prosentrokning
- at loysa einfaldar líkningar og vísa á dømi um nýtslu av brigdli í einføldum líkningum og formlum
- krossskipanina og sambandið millum tøl og tekning
- at nýta lummaroknara at loysa uppgávur og greiðsluevni.

**Geometri**

Næmingurin dugir

- at arbeiða við hugtøkunum *punkt*, *linjustykki*, *rættar linjur* og *vinklar*.
- hugtøkini *radius*, *tvørmát* og *vinkulmát*.
- at neyvtekna tríkantar, fýrkantar og sirklar
- at spegla, snara og javnflyta
- nýta krossskipan m.a. til at lýsa staðseting og flyting
- at brúka mátilutfall til at rokna fjarstøðu og gera einføld kort og arbeiðstekningar
- at máta við hóskandi mátieindum og umrokna frá einari eind til aðra, t.d. *cm*, *m* og *km*, *g*, *kg* og *tons* umframt *dl* og *l*.

**Støddfrøði í brúki**

Næmingurin dugir

- at velja roknihátt og rokna í teimum fýra rokniháttunum
- at umrokna frá okkara peningi til fremmant gjaldoyra
- at rokna í sambandi við keyp og sølu, so sum avslátt, vinning og tap
- einfalda renturokning, t.d. av innistandandi peningi og láni
- at savna og skipa dátur og hagtøl, og vísa tey við ritmyndum
- grundleggjandi hugtøk í talgildum rokniarki.

**Samskifti og spurdómar**

Næmingurin dugir

- at savna og skipa dátur í sambandi við eygleiðingar, spurnarkanningar og royndir
- at leggja úrslit fram í talvum og ritmyndum, at lesa og greina tær bæði munnliga, á pappíri og við hentleikunum í talgildum rokniarki
- at arbeiða saman um greiðsluevni, sum hava í sær fleiri loysnir.

# 4. flokkur

## Støddfrøði

Í uppgávusettinum í 4. flokki skuldu næmingarnir lata 72 svar, 61 rútar at skriva í og 11 fleirvalsuppgávur.




Talvan omanfyri vísir, hvussu nógvir næmingar hava svarað býtt út á hvørji 10%. Tað eru heilt fáir næmingar, sum hava minni enn 40% rætt.

## 6. flokkur
## Støddfrøði

Í 6. flokki vóru 88 svar (61 rútar at skriva í og 11 fleirval)




Talvan omanfyri vísir, hvussu nógvir næmingar hava svarað býtt út á hvørji 10%. Her er stór broyting í mun til svarini í 4. flokki. Nú eru fleiri næmingar, ið hava minni enn 40 % rætt.

# Náttúra og tøkni

Undirvísingin í lærugreinini hevur til endamáls

- at næmingurin við upplivingum og royndum fær innlit í fyribrigdi og samanhang í náttúruni
- at næmingurin fær innlit í, hvussu ymisk tøkni virkar, og lærir at nýta tól og amboð
- at hann víðkar hugsanir, mál og hugtøk, sum hava gerandisligt virði

- at næmingurin við eygleiðingum, kanningum og royndum mennir hegni, skapanarevni og samstarvsevni
- at kveikja gleði næminganna, forvitni og áhuga fyri náttúruni
- at menna áhugan fyri tøkni, lívstreytum og livikorum
- at næmingurin fær almenna vitan í landalæru, lívfrøði og alis-og evnafrøði
- at hjálpa næmingunum at fata samanspælið millum menniskjað og náttúruna úti og heima
- í huga og verki at menna ábyrgdina fyri náttúruni

## Ávegis mál í 4. flokki

Undirvísingin skal miða ímóti, at næmingar hava ognað sær kunnleika og fimi, sum ger teir førar fyri at

- lýsa fyribrigdi sum ljós, ljóð og rørslu
- lýsa gerandislig viðurskifti innan tøkni, sum el og magnet
- greiða frá lufttrýsti
- greiða frá plantum og dýrum og teirra liviumstøðum
- greiða frá vatnringrás og vatnnýtslu
- greiða frá vanligastu fiskasløgunum undir Føroyum og teirra liviumstøðum
- lýsa nøkur fuglasløg, føði og tilhald
- greiða frá sansunum
- duga oyggjarnar í Føroyum, hægstu fjøll og nakrar býir/bygdir
- kenna Norðurlond, høvuðsstaðir og fløgg
- kenna ættirnar og duga at brúka kumpass
- greiða frá um sólskipanina og sambandinum millum mánan, jørðina og sólina

## Ávegis mál í 6. flokki

Undirvísingin skal miða ímóti, at næmingar hava ognað sær kunnleika og fimi, sum ger teir førar fyri, at

- lýsa uppruna Føroya
- duga heimspartar, heimshøv og havstreymar
- greiða frá, hvussu náttúruvanlukkur ávirka liviumstøður hjá fólki og dýrum
- greiða frá sólskipanini og seta hana í samband við árstíðir, flóð og fjøru
- lýsa veðurlagsbelti
- kenna høvuðstættirnar í okkara fiskivinnu, veiðireiðskap og skipasløg
- greina liviumstøður hjá plantum og dýrum, vistskipanir og føðiketur
- kenna vanligastu fuglasløgini í Føroyum
- kenna vanligastu fiskasløgini í Føroyum
- kenna vanligastu dýrasløgini í Føroyum
- greiða frá høvuðs kropsgøgnum hjá fólki og teirra týdningi
- lýsa, hvussu matur og rørsla ávirka okkum
- greiða frá og duga hugtøk um streymnýtslu, streymkeldur, javnstreym og vendistreym
- lýsa, hvussu tøkni og dálking kunnu ávirka lívskorini hjá plantum, dýrum og menniskjum
- læra og nýta náttúruvísindaligt arbeiðslag við atliti at spurdómum, fyrireika og gera kanningar og samanbera kanningarúrslit
- læra at velja og nýta viðkomandi amboð og tól í kanningararbeiðnum, t.d. stereoluppar og indikatorar
- leggja fram kanningarúrslit og nýta ymiskar framløguhættir, sum grafar, tekstir, fyrilestur og drama

## 4. flokkur
## Náttúra og tøkni

Í uppgávusettinum vóru 27 spurningar.




Talvan omanfyri vísir, hvussu nógvir næmingar hava svarað býtt út á hvørji 10%.
Tað eru bert hendinga næmingar, sum hava minni enn 40% rætt.

# 6. flokkur
## Náttúra/tøkni
Í uppgávusettinum vóru 28 spurningar.




Talvan omanfyri vísir, hvussu nógvir næmingar hava svarað býtt út á hvørji 10%. Eisini her eru bert heilt fáir næmingar, sum fáa minni enn 40% rætt.

# Royndarúrslit
# Seinnni partur

**Føroyskt í 4. og 6. flokki**

## Uppgávusettini til landsroyndina 2015

Uppgávurnar eru gjørdar í og til Chamiloskipanina. Samanborið við eina pappírsuppgávu, hevur skipanin avmarkingar í mun til uppseting, og at fáa nævingin at framleiða ávísar uppgávur, men harafturímóti fáa næmingarnir skjóta afturmelding.
Einstøku uppgávurnar hava eitt ávíst snið, sum skipanin loyvir, eitt stigatal og rætt svar. Fyri at geva øllum næmingunum avbjóðingar, vóru skipaðar lættari og torførari uppgávur, og har tað var møguligt, vóru uppgávurnar soleiðis, at tær lættaru uppgávurnar komu fyrst emst, og tær torføraru seinast.
Uppgávurnar taka støði í námsætlanini, og landsroyndin í føroyskum í 2015 er umfatað av trimum kjarnaøkjum í námsætlanini, ið eru:

- Skrivaða málið
- Samansettir tekstir
- Málkunnleiki

## Landsroyndin í 4. flokki

Royndin í 4. flokki er í tveimum pørtum: fyrisøgn og at lesa og skilja tekst.

## Fyrisøgn

Fyrisøgnin var mett at hóska til 4. flokk. Fyrisøgnin innihelt fjølbroytt orðaval við styttri og longri orðum og orðum, ið krevja ávísan mállæruførleika. Í skipanini ber til hjá næmingunum at hoyra fyrisøgnina lisna so ofta, sum tørvur er á.
Tað, sum næmingarnir eru vanir at skula fyrihalda seg til, er, at lærarin lesur fyri, men nú hava næmingar til sín fyrimun møguleika fyri at hoyra orðini umaftur eftir egnum tørvi.
Heldur enn at seta fyrisøgnina upp í ein langan tekst, var hon býtt upp í partar. Hetta var gjørt, so at næmingarnir skuldu sleppa undan at skrulla, og fyri at lætta um hjá tí veika næminginum.

## Lesa og skilja tekst

Uppgávusettini eru bygd upp við teimum løttu uppgávunum fyrst t.d. eitt orð til eina mynd, setningar til eina mynd, avlesa myndir, og seinni í uppgávuni vóru styttri og longri tekstir.
Uppgávusettið hevði ymisk tekstasløg við, t.d. yrkistekst, søgn, ævintýr, fakligan tekst, vanligan barnatekst umframt orðatiltøk, og hvat merkir orðið.

## Landsroyndin í 6. flokki

Royndin í 6. flokki er í trimum pørtum: fyrisøgn, mállæra og at lesa og skilja tekst.
Uppgávusettið var skipað um eitt evni, sum skuldi vera reyði tráðurin í lesifatan, eisini í fyrisøgnini.

## Fyrisøgn

Fyrisøgn hevði tekst við lættari orðum, torførari orðum og orðum, ið krevja mállæruførleikar. Sum áður nevnt, so ber til hjá næmingunum at hoyra fyrisøgnina lisna so ofta, sum tørvur er á. Eins og í 4. flokki var fyrisøgnin býtt upp í partar. Hetta fyri at næmingarnir skuldu sleppa undan at skrulla, her verður eisini hugsað um tann veika næmingin.

## Mállæra

Í mállæruuppgávuni vóru uppgávur, sum mett var, at næmingarnir hava verið ígjøgnum. Ymsu uppgávurnar fevndu um fimm orðaflokkar, har størsti parturin umfataði navnorð, sagnorð og lýsingarorð. Harafturat skuldu næmingarnir greina setningar.

## Lesa og skilja tekst

Uppgávuna lesifatan var bygd um eitt evni, sum næmingar helst kenna væl aftur í gerandisdegnum. Næmingarnir, sum uppgávan snúði seg um, høvdu ein virknan leiklut í sjálvum spurningunum til uppgávurnar. Vald vóru ymisk tekstasløg, og ein tekstur var høvuðstekstur. Høvuðsteksturin var fagurbókmentir. Hini tekstasløgini vóru yrking, ævintýr, faktekstur og yrkistekstur. Spurningarnir løgdu fyri tað mesta upp til, at næmingarnir nýttu punktlesing og yvirlitslesing. Onkrir tulkingarspurningar og orðabókauppgávur vóru eisini í uppgávuni.

## Landsroyndin 2015 samanborin við landsroyndina 2013

Landsroyndin í 2015 er tann fyrsta, ið er gjøgnumførd á teldu samanborið við tær undanfarnu, ið vóru á pappíri. Um vit hugsa um bygnaðin á uppgávunum í føroyskum, er størsti munurin helst tann, at valið av tekstum er øðrvísi. Onkrar smærri broytingar eru í mállæruuppgávuni.

Fyrisøgnin, 4. flokkur: næmingarnir skuldu skriva 100 orð samanborið við 91 orð í 2013. Samlaða nøgdin av orðum í fyrisøgnini í 2015 er 323 orð í mun til 277 orð í 2013.

Lesa og skilja tekst, 4. flokkur: næmingarnir skuldu svara 124 spurningum samanborið við 115 í 2013. Allir spurningarnir vóru fleirval.

Fyrisøgn, 6. flokkur: næmingarnir skrivaðu 148 orð samanborið við 151 orð í 2013. Samlaða nøgdin av orðum í fyrisøgnini 2015 var 412 orð í mun til 433 orð í 2013.

Lesa og skilja tekst, 6. flokkur: næmingarnir skuldu svara 58 spurningum samanborið við 40 í 2013. Allir spurningarnir vóru fleirval.

Mállæra, 6. flokkur: tað vóru 101 spurningar (26 rútar at skriva í og 75 fleirval) samanborið við 110 spurningar í 2013. Spurningarnir í 2013 vóru allir fleirval.

## Úrslitið til einstaka næmingin

Næmingurin kann saman við avvarðandi rita seg inn á skipanina svar.fo beint eftir lokna roynd og síggja úrslitið av royndini. Tey kunnu síggja, hvussu gekst í fyrisøgn og í einstøku uppgávunum í lesifatan og mállæru, hvussu samlaða úrslitið var, og hvat nummar næmingurin bleiv í bólkinum.

## Svar til einstaku uppgávurnar

Myndin niðanfyri er 1. partur av eini fyrisøgn og vísir, hvussu næmingurin sær fyrisøgnina. Tað grøna er rættilisti, og tað svarta er tað, ið næmingurin hevur skrivað. Um næmingurin hevur svarað rætt, stendur orðið við svørtum, men um svarið er skeivt, er orðið litað reytt og hevur striku tvørtur ígjøgnum. Her á myndini hevur næmingurin 21 røtt svar og fýra villur




## Einstøku økini í føroyskum og samlaða úrslitið

Sum áður nevnt, er landsroyndin í føroyskum 2015 býtt í 3 kjarnaøki, ið taka støði í námsætlanini. Myndirnar niðanfyri vísa, hvussu úrslitið hjá næminginum var í fyrisøgn og mállæru.




Hesin næmingurin hevur staðið seg væl. Av 100 møguligum stigum fekk næmingurin: 89,86 stig í fyrisøgn og 94,06 stig í mállæru.
Afturmeldingina um egið avrik fær hvør næmingur, tá ið hann hevur endað royndina. Afturmeldingarnar kunnu vera góð amboð hjá næminginum at meta um støðuna, bæði í fyrisøgn, lesifatan og mállæru. Úrslitið kann vera ein ábending um, hvat næmingurin skal leggja størri orku í.

## Úrslit til læraran frá svar.fo

Lærarin sær eisini úrslitið í skipanini svar.fo í tí løtu, næmingurin hevur endað royndina. Lærarin sær úrslitið hjá einstaka næminginum. Somuleiðis kann hann rokna seg fram til úrslitið í miðal, samlaða úrslitið fyri sín skúla og flokk, og hvussu skúlin hevur staðið seg í einstøku spurningunum. Í fleirvalspurningum ber eisini til hjá læraranum at síggja, hvussu nógvir næmingar hava valt einstøku svarmøguleikarnar.

## 4. flokkur

## Lesa og skilja tekst

Í 4. flokki vóru 735 næmingar til landsroynd í at lesa og skilja tekst. Í uppgávusettinum í 4. flokki skuldu næmingarnir svara 56 spurningum, og allir vóru fleirvalspurningar.

## Úrslit frá royndini

Úrslitið í miðal er 87%, og medianin er 90%.
Talvan niðanfyri vísir úrslit frá samløgurásini við samanløgdum týddum hjá næmingunum.
Á næstu síðu er samløgurásin við frágreiðingum!

"FOROYSKT4-8"
735 næmingar.

| 1st Qu. | Median | 3rd Qu. | Í mesta lagi | Miðal |
|---|---|---|---|---|
| 81 % | 90 % | 94 % | 100 % | 87 % |




Hyggja vit at prosentbýtinum hjá næmingunum í mun til røtt úrslit, sær myndin soleiðis út:

50% hava millum 90 og 100% røtt úrslit

30% hava millum 80 og 90% røtt úrslit

18% hava millum 60 og 80% røtt úrslit

2% hava millum 0 og 60% røtt úrslit.

Sera nógvir næmingar svara nógv rætt. Hetta kann vera tí, at bygnaðurin í hesi uppgávuni líkist nógv teimum undanfarnu, og tí hava næmingarnir eina ávísa venjing í at loysa tílíkar uppgávur. Teldan ger tað lættari at svara ymsum uppgávum í tí líki, sum tær higartil hava verið.

Tær løttu uppgávurnar liggja fyrst í uppgávusettinum, hetta er gjørt við atliti at teimum veikaru næmingunum. Lættaru uppgávurnar liggja fremst og torføraru síðst. Nógvur tekstur var í uppgávuni, ogtorleikastøðið var hóskandi.

Úrslitið bendir á, at nakrar av uppgávunum eru ov lættar, t.d  fyrstu uppgávurnar, sum eru at skilja eitt orð og finna mynd, sum hóskar til, eru ov lættar og hoyra ikki heima í eini roynd til 4. flokk.

Talvan á næstu síðu vísir, hvussu úrslitið hjá næminginum er í mun til tíðina, sum næmingurin sat við uppgávuni, áðrenn hann endaði royndina.




Ein eygleiðing út frá hesari ritmynd er, at nakrir av næmingunum hava sitið í stutta tíð og klárað seg væl, men teir flestu næmingarnir hava sitið í samfullar 45 minuttir og loyst uppávuna. Hóast royndartíðin er 45 minuttir, síggja vit, at fleiri næmingar brúka millum 45 og 60 minuttir. Hetta eru helst næmingar, sum hava tikið av tilboðnum um longda royndartíð.

## 4. flokkur

## Fyrisøgn

Í 4. flokki vóru 740 næmingar til landsroynd í fyrisøgn. Fyrisøgnin var innsetingarfyrisøgn, har næmingarnir skuldu skriva 100 orð.

## Úrslit frá royndini

Úrslitið í miðal er 72%, og medianin er 75%.
Talvan niðanfyri vísir úrslit frá samløgurásini við samanløgdum týddum hjá næmingunum.
Á næstu síðu er samløgurásin við frágreiðingum!

”FOROYSKT4-7”
740 næmingar

| 1st Qu. | Median | 3rd Qu. | Í mesta lagi | Miðal |
|---|---|---|---|---|
| 63 % | 75 % | 84 % | 100 % | 72 % |




Hyggja vit at prosentbýtinum hjá næmingunum í mun til røtt úrslit, sær myndin soleiðis út:

8% hava millum 90 og 100% røtt úrslit

28% hava millum 80 og 90% røtt úrslit

45% hava millum 60 og 80 % røtt úrslit

19% hava millum 0 og 60 % røtt úrslit.

Helvtin av næmingunum hevur 76% ella meira rætt.

Teldan er eitt gott amboð til fyrisøgn. Skipanin er sera smidlig, tá ið vit hugsa um møguleikarnar at leita í orðabók. Hugsanin við at býta fyrisøgnina í partar var eisini at gera tað lættari hjá næminginum at fylgja við ljóðfílunum, at sleppa undan at skrulla, og so høvdu næmingarnir betri yvirlit, meðan teir skrivaðu.




Tað er ógvuliga ymiskt, hvussu langa tíð næmingarnir hava brúkt til royndina, og hvussu tey hava klárað seg, men vit síggja, at tá ið 35 minuttir vóru farnir, hevði helvtin av næmingunum endað royndina. Samstundis síggja vit eisini, at úrslitini av royndini liggja spjødd.

## 6. flokkur

## Lesa og skilja tekst

Í 6. flokki vóru 689 næmingar til landsroynd í lesifatan. Í uppgávusettinum í 6. flokki skuldu næmingarnir svara 58 spurningum, har allir vóru fleirvalsspurningar.

## Úrslit frá royndini

Úrslitið í miðal er 75%, og median er 79%.
Talvan niðanfyri vísir úrslit frá samløgurásini við samanløgdum týddum hjá næmingunum.
Á næstu síðu er samløgurásin við frágreiðingum!

”FOROYSKT6-9”'
689 næmingar

| 1st Qu. | Median | 3rd Qu. | Í mesta lagi | Miðal |
|---|---|---|---|---|
| 66 % | 79 % | 83 % | 100 % | 78 % |




Hyggja vit at prosentbýtinum hjá næmingunum í mun til røtt úrslit, sær myndin soleiðis út:

17% hava millum 90 og 100% røtt úrslit.

33% hava millum 80 og 90% røtt úrslit.

31% hava millum 60 og 80% røtt úrslit.

19% hava millum 0 og 60% røtt úrslit.

Hyggja vit at kurvini Foroyskt6-9 síggja vit, at 50% av næmingunum hava 79% rætt, og 10% av næmingunum hava 93% rætt.

Vit síggja, at tann grøna kurvan liggur til høgru fyri ta bláu kurvuna. Hetta er ein ábending um, at uppgávurnar vóru lættar í byrjanini av uppgávusettinum. Um uppgávusettið ikki hevði innihildið tær lættaru uppgávurnar, hevði tann grøna kurvan ligið nærri tí bláu.




Vit síggja, at nógvir av næmingunum hava brúkt áleið 45 minuttir, ella so at siga alla tíðina, til uppgávuna.

Sum sæst er ein ávís spjaðing í, hvussu langa tíð næmingarnir brúka at loysa sína uppgávu. Einstakir næmingar brúka sera stutta tíð og fáa eitt gott úrslit, meðan aðrir næmingar brúka nógv longri tíð og fáa júst somu úrslit.
Av teimum næmingum, sum fáa eitt verri úrslit, eru nakrir, sum hava brúkt stutta tíð, meðan tað eru aðrir, sum velja at sita alla tíðina. Úrslitið er kortini tað sama.

# 6. flokkur

## Fyrisøgn

Í 6. flokki vóru 681 nemingar til landsroynd í fyrisøgn. Fyrisøgnin var innsetingarfyrisøgn, har næmingarnir skuldu skriva 148 orð.

## Úrslit frá royndini

Úrslitið í miðal er 72%, og medianin er 75%.
Talvan niðanfyri vísir úrslit frá samløgurásini við samanløgdum týddum hjá næmingunum.
Á næstu síðu er samløgurásin við frágreiðingum!

”FOROYSKT6-8”
681 næmingar

| 1st Qu. | Median | 3rd Qu. | Í mesta lagi | Miðal |
|---|---|---|---|---|
| 72 % | 82 % | 88 % | 100 % | 78% |




Hyggja vit at prosentbýtinum hjá næmingunum í mun til røtt úrslit, sær myndin soleiðis út:

2% hava millum 90 og 100% røtt úrslit.

51% hava millum 80 og 90% røtt úrslit.

35% hava millum 60 og 80% røtt úrslit.

12% hava millum 0 og 60% røtt úrslit.

Meira enn helvtin av næmingunum hevur millum 80-100% rætt.

Eins og í 4. flokki bleiv fyrisøgnin býtt í partar við tí í huga at gera tað lættari at goyma hvønn partin, og fyri at næmingarnir skuldu sleppa frá at skrulla. Í mun til tá ið lærarin lesur fyri, hava næmingarnir til sín fyrimun møguleika fyri at hoyra orðini umaftur eftir egnum tørvi.
Eftir úrslitinum at døma kann fyrisøgnin annaðhvørt hava verið ov løtt, ella eru næmingarnir væl fyri.

Orsøkin, at so nógvir næmingar klára seg so væl, kann eisini vera møguleikarnir við eini talgildari fyrisøgn.




Næstan allir næmingarnir brúktu meira enn 20 minuttir, og royndin varði í 45 minuttir.

Tað er ógvuliga ymiskt, hvussu langa tíð næmingarnir hava brúkt til royndina, og hvussu tey hava klárað seg, men vit síggja, at tá ið 35 minuttir vóru farnir, hevði helvtin av næmingunum endað royndina. Samstundis síggja vit eisini, at úrslitini av royndini liggja spjødd.

## 6. flokkur

## Mállæra

Í 6. flokki vóru 677 næmingar til landsroynd í málløru. Í uppgávusettinum í 6. flokki skuldu næmingarnir svara 101 spurningum, har 75 vóru fleirvalsspurningar, og 26 vóru rútar at skriva í.

## Úrslit frá royndini

Úrslitið í miðal er 78%, og medianin er 81%.
Talvan niðanfyri vísir úrslit frá samløgurásini við samanløgdum týddum hjá næmingunum.
Á næstu síðu er samløgurásin við frágreiðingum!

”FOROYSKT6-10”
677 næmingar

| 1st Qu. | Median | 3rd Qu. | Í mesta lagi | Miðal |
|---|---|---|---|---|
| 71 % | 81 % | 87 % | 100 % | 78% |




Hyggja vit at prosentbýtinum hjá næmingunum í mun til røtt úrslit, sær myndin soleiðis út:

16% hava millum 90 og 100% røtt úrslit

35% hava millum 80 og 90% røtt úrslit

37% hava millum 60 og 80% røtt úrslit

12 % hava millum 0 og 60 % røtt úrslit.

Hyggja vit at kurvini Foroyskt6-10 síggja vit, at 50% av næmingunum hava 81% rætt, og 10% av næmingunum hava 92% rætt.




Flestu næmingar brúka alla tíðina og liggja omanfyri miðjuna.

Einstakir næmingar brúka stutta tíð og fáa eitt sera gott úrslit, meðan aðrir næmingar brúka meira tíð og fáa eitt nógv verri úrslit.

.

## Samanburður millum 4. og 6. flokk

Talvan niðanfyri vísir, hvussu stórur partur av næmingunum í 4. og 6. flokki hava fingið millum 90% og 100% røtt úrslit, o.s.fr.

**Fyrisøgn**

| Næmingaúrslit bólkað eftir úrsliti | 4. flokkur | 6. flokkur |
|---|---|---|
| Millum 90% og 100% røtt úrslit | 8% | 2% |
| Millum 80% og 90% røtt úrslit | 28% | 51% |
| Millum 60% og 80% røtt úrslit | 45% | 35% |
| Millum 0% og 60% røtt úrslit | 19% | 12 % |

**Lesifatan**

| Næmingaúrslit bólkað eftir úrsliti | 4. flokkur | 6. flokkur |
|---|---|---|
| Millum 90% og 100% røtt úrslit | 50% | 17% |
| Millum 80% og 90% røtt úrslit | 30% | 33% |
| Millum 60% og 80% røtt úrslit | 18% | 31% |
| Millum 0% og 60% røtt úrslit | 2% | 19% |

Hyggja vit at rættleikaprosentunum fyri báðar flokkarnar, síggja vit, at tey líkjast mest í bólkunum lesifatan 80% - 90% og í fyrisøgnini 90%-100%.

Eitt, sum er sermerkt fyri 4. flokk, er, at í fyrisøgn fingu 36% av næmingunum millum 80-100% rætt, men í lesifatanini fingu 80% av næmingunum millum 80 og 100% rætt. Bera vit saman við 6. flokk, síggja vit, at í fyrisøgn fingu 53% av næmingunum millum 80 og 100% rætt, og í lesifatan fingu 50% av næmingunum millum 80 og 100% rætt. Ein góð eygleiðing er, at bert 2-% av næmingunum í 6. flokki hava alla ella næstan alla fyrisøgnina rætta. Hugsast kann, at orsøkin til hetta er, at her vóru vald fleiri orð, ið krevja ávísar mállæruførleikar.

Vert er at leggja merki til, at stórur munur er á, hvussu næmingarnir hava klárað seg í lesifatan í 4. og 6. flokki. Bert 2% av næmingunum í 4. flokki liggja í niðasta bólkinum (0 – 60%), meðan 19% av næmingunum í 6. flokki liggja í sama bólki.

Úrslitið í lesifatan í 4. flokki bendir á, at royndin kanska hevur verið ov løtt samanborið við úrslitið í 6. flokki. Orsøkin kann vera, at uppgávan í lesifatan í 4. flokki líktist rættiliga nógv uppgávunum undanfarin ár. Næmingarnir plaga at brúka tíð til at venja gamlar uppgávur frá øðrum landsroyndum, og tí vórðu næmingarnir í 4.lokki ikki tiknir á bóli, tá teir vóru til landsroyndina, men kundu fyrihalda seg til nakað, sum teir frammanundan vóru sera tryggir í. Hinvegin er munurin ímillum uppgávuna í lesifatan í 6. flokki í ár og undanfarin ár væl størri, tí at tekstaúrvalið er breiðari, enn tað hevur verið.

**Støddfrøði í 4. og 6. flokki**

28. apríl og 29. apríl 2015 vóru ávikavist 4. flokkur og 6. flokkur til Landsroynd í støddfrøði. Hetta er fyrsta árið, at Landsroyndin var roynd í Chamilo skipanini á svar.fo. Innleiðandi kann sigast, at royndin tekniskt gekst væl. Allir næmingar fingu loggað inn, lisið uppgávuorðingarnar og loyst uppgávurnar uttan trupulleikar. Eisini kann sigast, at næmingar og foreldur/verjar hava tikið ógvuliga væl ímóti, at úrslitini vóru tøk, beint sum landsroyndin var liðug. Hetta hevur givið møguleikar til eitt gott fakligt prát heima um úrslitið hjá einstaka næminginum. Lærarin/skúlin hevur nú fingið eina nýggja skipan ella eitt amboð, har hann beinanvegin eftir royndina millum annað sær, hvussu einstaki næmingurin hevur staðið seg, hvussu skúlin hevur staðið seg, bæði í ymsu økjunum í støddfrøði og samanlagt.

# Uppgávusettini til Landsroyndina 2015

Uppgávurnar eru gjørdar í og til Chamilo skipanina. Samanborið við eina pappírsuppgáva, hevur skipanin avmarkingar í mun til uppseting, og at fáa næmingin at framleiða (serliga geometri og krossskipan), men fleiri møguleikar eru í mun til uppgávusnið og at fáa skjóta afturmelding.
Einstaku uppgávurnar hava eitt ávíst snið, sum skipanin loyvir, eitt stigatal og rætt svar. Afturat hesum er hvør uppgáva knýtt at einum høvuðsøki í støddfrøði. Landsroyndirnar eru býttar í 7 høvuðsøki, ið eru í tráð við førleikamálini í námsætlanini í støddfrøði.
Økini eru:

- Tøl og roknihættir
- Algebra
- Geometri
- Krossskipan
- Rokniark
- Dátur og hagtøl
- Samskiftið og spurdómar

At uppgávurnar eisini eru tengdar at einum høvuðsøki ger, at lærari og næmingar kunnu síggja, hvussu støðan er í einstaku økjunum í støddfrøði. Uppgávusettini eru bygd í tyssum av uppgávum í einum høvuðsøki. Í teimum høvuðsøkjum, har tað bar til, verður byrjað við løttum uppgávum og síðan gerast uppgávurnar torførari í sama evni. Á henda hátt fáa flestu næmingarnir avbjóðingar á teirra støði. Næstan allir næmingarnir megna fyrstu løttu uppgávurnar, og síðan fáa dugnaligu næmingarnir torførari avbjóðingar.

## Landsroyndin 2015 samanborin við undanfarnar landsroyndir

Landsroyndin í 2015 er væl øðrvísi enn undanfarnar landsroyndir. Henda landsroyndin er tann fyrsta, ið er gjøgnumførd á teldu samanborið við tær undanfarnu, ið vóru á pappíri. Harafturat er talið av spurningum í landsroyndini í 2015 størri enn talið av spurningum í undanfarnum landsroyndum:

- Í 4. flokki vóru 72 svar (61 rútar at skriva í og 11 fleirval) samanborið við 40 svar í 2013 (í 2013 skuldu næmingarnir eisini konstruera í geometri).
- Í 6. flokki vóru 88 svar (61 rútar at skriva í og 11 fleirval) samanborið við 55 svar í 2013 (í 2013 skuldu næmingarnir seta í krossskipan og eisini konstruera í geometri).

Grundin til, at talið av uppgávum er økt í ár, er fyri at geva øllum næmingunum avbjóðingar, ið hóska betur til teirra støði.

Afturat hesum byggir landsroyndin í ár heilt á førleikamálini í námsætlanini. Alt hetta ger, at úrslitini frá landsroyndini í 2015 ikki beinleiðis kunnu samanberast við úrslitini frá undanfarnu landsroyndum.

## Svar frá svar.fo til einstaka næmingin

Næmingurin og avvarðandi kunnu logga á skipanina svar.fo beint eftir lokna roynd og síggja, hvussu tað gekk hjá næminginum. Tey kunnu síggja, hvussu tað gekk í einstøku uppgávunum, í einstøku økjunum í støddfrøði, og hvussu samlaða úrslitið var.

## Svar til einstaku uppgávurnar

Myndin niðanfyri vísir, hvussu næmingurin sær einstøku uppgávurnar. Tað grøna er tað, ið næmingurin hevur skrivað, og frammanfyri er rætt úrslit skrivað. Er rætta úrslitið litað reytt og hevur striku tvørtur ígjøgnum, er loysnin hjá næminginum skeiv. Her á myndini hevur næmingurin 6 røtt svar og eina villu.



## Einstaku økini í støddfrøðini og samlaða úrsliti

Sum áður nevnt, so er landsroyndin í støddfrøði býtt í 7 øki í tráð við førleikamálini í námsætlanini í støddfrøði. Myndin niðanfyri vísir, hvussu næmingurin kláraði  seg í einstaku økjunum í støddfrøði, og hvussu samlaða úrslitið hjá næminginum var. Hesin næmingurin hevur staðið seg væl. Alt rætt (100%) í 4 økjum, smáar villur í tveimum og 50% rætt í "Rokniark".  Samlaða úrslitið var 94,44%.

**2015 Landsroynd Støddfrøði 4 : Úrslit**

**Navn**
**Brúkaranavn**
**FirstClassId**
**Byrjunardagur** Mars 12, 2015 at 10:02 PM
**Samlað tíð** 00 : 10 : 48

| Spurnarslag | Absolut úrslit | Lutfalsligt úrslit |
|---|---|---|
| Tøl og roknihættir | 95.24 / 100 | 95.24% |
| Algebra | 100 / 100 | 100% |
| Geometri | 100 / 100 | 100% |
| Krossskipan | 80 / 100 | 80% |
| Rokniark | 50 / 100 | 50% |
| Dátur og hagtøl | 100 / 100 | 100% |
| Samskifti og spurdómar | 100 / 100 | 100% |
| Total | 94.44 / 100 | 94.44% |

**Stig fyri royndina: 94.44 / 100**

Hesa afturmelding um egið avrik fær hvør næmingur, við at logga seg á skipanina svar.fo. Mett verður, at hesar báðar afturmeldingarnar eru góð amboð hjá næminginum at meta um støðuna, bæði í einstaku spurningunum og í einstaku økjunum. Og út frá hesum at seta kós í støddfrøði arbeiðinum grundað á úrslitini.

## Svar til læraran frá svar.fo

Lærarin sær eisini úrslitið í skipanini svar.fo, samstundis sum næmingurin hevur latið sítt svar inn. Lærarin sær úrslitið hjá einstaka næminginum, eins og næmingurin ger. Lærarin sær eisini samanteljing í hansara skúla, hvat miðalúrslitið var fyri skúlan, og hvussu skúlin hevur staðið seg í einstaku spurningunum. Í fleirvalsspurningum kann lærarin eisini síggja, hvussu nógvir næmingar hava valt einstaka svarmøguleikan. Lærarar, tosað hevur verið við, eru glaðir fyri  møguleikan at síggja, hvussu skúlin hevur klárað seg í einstaku spurningunum. Í skúlum við fleiri flokkum á sama floksstigi síggja teir í ár tó bara úrslitið fyri allan skúlan, men kunnu sjálvsagt rokna meðal út fyri sínar næmingar. Her vildu lærarar tó ynskt, at teir sóu úrslitini hjá hvørjum flokki sær. Floksmeðal var sent skúlunum við fleiri flokkum á sama aldurstrini ein lítlan mánað eftir, at royndin var hildin.

# 4. flokkur

Í fjórða flokki vóru 717 næmingar til landsroynd. Í uppgávusettinum í 4. flokki skuldu næmingarnir lata 72 svar, 61 rútar at skriva í og 11 fleirvalsuppgávur. Royndin gekk væl tøkniliga, og næmingarnir skiltu uppgávurnar. Bæði næmingar, avvarðandi og lærarar vóru væl nøgd við uppgávubygnað og afturmeldingina frá skipanini svar.fo.

## Úrslit frá royndini

Miðal úrslitið er 74,12, og medianin er 77,78.
Talvan niðanfyri vísir úrslit frá samløgurásini við samanløgdum týddum hjá næmingunum í støddfrøði í 4. flokki, sum er undir talvuni.

"STODDFRODI4-4"
Næmingar = 717

| 1st Qu. | Median | 3rd Qu. | Max. | Miðal |
|---|---|---|---|---|
| 65.28 | 77.78 | 86.11 | 100.00 | 74.12 |




Hyggja vit at prosentbýtinum hjá næmingunum í mun til røtt úrslit, sær myndin soleiðis út:

10% hava millum 90 og 100% røtt úrslit

35% hava millum 80 og 90% røtt úrslit

35% hava millum 60 og 80% røtt úrslit

20% hava millum 0 og 60% røtt úrslit

Verður hugt at úrslitunum fyri alt landið sæst eisini, at kurvan ikki byrjar fyrr enn umleið 35%. Hetta gevur eina ábending um, at fleiri lættar uppgávur hava verið í settinum. Tað samsvarar eisini væl við ætlanina, at hava nakrar lættar uppgávur í byrjanini, so at allir næmingar skulu klára ein part og á tann hátt fáa kensluna at megna og lukkast.

Talvan niðanfyri vísir, hvussu úrslitið hjá næminginum er í mun til tíðina, sum næmingurin sat við uppgávuni, áðrenn hann lat uppgávuna inn




Ein eygleiðing út frá hesum grafinum er, at nakrir næmingar, ið hava avleverað eftir 30 til 35 minuttir, hava hóast tað fingið millum 80% og 100% rætt. Teir flestu næmingarnir hava sitið í samfullar 45 minuttir. So ymiskt er, bæði hvussu næmingar standa seg, og hvussu leingi teir sita við landsroyndini.

Sum heild hevur verið lagt seg eftir at byrja við løttum uppgávum, so næmingarnir føla ein ávísan tryggleika. Møguliga hevði tað verið eitt hugskot at gjørt hesar uppgávur eitt sindur torførari, ella sett tær øðrvísi upp, so at fleiri fáa størri fakligar avbjóðingar.

Tað hevur ivaleyst eisini havt sína ávirkan, at næmingarnir, áðrenn veruligu landsroyndina, hava roynt tær báðar undanfarnu royndirnar. Vit hava sæð í skipanini, at næmingar hava vant undanroyndirnar omanfyri 2.000 ferðir, tvs. her er talan um venjing til roynd. Á tann hátt hava næmingarnir verið tryggir við skipanina.

# 6. flokkur

Í 6. flokki vóru 702 næmingar til landsroynd. Í uppgávusettinum vóru 88 svar, 61 rútar at skriva í og 11 fleirvalsuppgávur. Royndin gekk væl tøkniliga, næmingarnir skiltu uppgávurnar. Næmingar, avvarðandi og lærarar vóru, eins og í 4. flokki, væl nøgd við afturmeldingina frá skipanini svar.fo. Tó hevði ein villa vilt seg inn í skipanina. Í uppgávu 19 høvdu líkningarnar fingið tillutað 10 stig hvør í skipanin, heldur enn eitt stig hvør. Tað gjørdi, at nakrir næmingar sóu skeivt stigatal, beint eftir at teir høvdu latið inn. Hetta førdi til fjáltur, men henda villan í skipanini var skjótt rættað, so næmingarnir fingu rætt úrslit. Vit harmast um mistakið. Men vit meta ikki, at tað hevði nakra ávirkan á úrslitið hjá einstaka næminginum ella í samlaða úrslitinum.

## Úrslit frá royndini

Miðal úrslitið er 67% og medianin er 64%.




Talvurnar niðanfyri vísa úrslit frá samløgurásini við samanløgdum týddum hjá næmingunum í støddfrøði í 6. flokki.

Hyggja vit at prosentbýtinum hjá næmingunum í mun til røtt úrslit, sær myndin soleiðis út:

10% hava millum 90 og 100% røtt úrslit

15% hava millum 90 og 90% røtt úrslit

35% hava millum 60 og 80% røtt úrslit

40% hava millum 0 og 60% røtt úrslit

"STODDFRODI6-3" Næmingar = 695

| 1st Qu. | Median | 3rd Qu. | Max. | Miðal |
|---|---|---|---|---|
| 45.60 | 64.00 | 78.40 | 100.00 | 64.00 |

At tað eru 40% av næmingunum, ið klára niðanfyri 60% av uppgávunum, er hægri enn í 4. flokki. Møguliga er ein partur av frágreiðingini, at tað eru øki í førleikamálunum, ið nógvir næmingar í 6. flokki ikki eru stinnir í. Tað kann eisini vera, at næmingarnir havar ilt við at skilja ávís øki, ella tey ikki hava arbeitt so nógv við hesum øki innan støddfrøði. Eisini kann hugsast, at uppgávuorðingar hava verið óhepnar ella torførar í økjum, har næmingar hava trupulleikar og einki stig heinta. Hetta kann tó bert greiða frá einum parti av mununum. Hin frágreiðing er helst, at tað eru fleiri næmingar í 6. flokki, ið hava trupult við støddfrøði enn í 4. flokki.

Skipanin vísir eisini, at næmingarnir í 6. flokki ikki hava vant undanroyndirnar eins nógv og næmingarnir í 4. flokki. Hetta kann hava givið fleiri næmingum eina kenslu av ótryggleika við skipanina og støðuna. Tí hetta er fyrstu ferð, at teir hava verið til veruliga talgilda roynd. Og av tí er úrslitið lakari enn tað í 4. flokki.




Stórt sæð allir næmingar í 6. flokki hava brúkt allar 60 minuttirnar, ið avsettir vóru til royndina - stórur partur nakað meira eisini.
Eisini teir næmingar, ið ikki høvdu góð úrslit, hava ikki latið inn, fyrr enn tíðin er farin. Hetta gevur eina ábending um, at flestu næmingarnir hava tikið royndina í álvara. Teir hava følt uppgávurnar motiverandi og hava roynt tað, teir kunnu, til seinastu løtu.

# Samanbering millum 4. og 6. flokk

Talvan niðanfyri vísir, hvussu stórur partur av næmingunum, í ávikavist 4. og 6. flokki, hava fingið millum 90% og 100% røtt úrslit, o.s.fr.

| Næmingaúrslit bólkaði eftir úrsliti | 4. flokkur | 6. flokkur |
|---|---|---|
| Millum 90% og 100% røtt úrslit | 10% | 10% |
| millum 80% og 90% røtt úrslit | 35% | 15% |
| millum 60% og 80% røtt úrslit | 35% | 35% |
| millum 0% og 60% røtt úrslit | 20% | 40% |

Út frá talvuni síggja vit, at parturin av næmingum, sum fáa millum 90% og 100% rætt er tann sami, 10%, bæði fyri 4. flokk og 6. flokk. At parturin av næmingum, ið standa seg sera væl í landsroyndini í støddfrøði, er tann sami í 4. til 6. Flokk, kann vera tí, at nakrar uppgávur eru truplar, og bert tey sera dugnaligu standa seg sera væl.

Parturin av næmingum, sum fáa minni enn 60% rætt, er í 4. flokki 20% av næmingunum, meðan í 6. flokki 40% av næmingunum. Tá ið árgangirnir eru umleið líka stórir, eru tað sostatt tvær ferð so nógv í 6. flokki, ið klára seg illa, enn tað eru í 4. flokki. Mett verður ikki, at hetta bara kann skyldastat uppgávurnar í 6. flokki eru torførari. Hetta kundi bent á, at tað frá 4. til 6. flokk eru fleiri næmingar, ið fáa trupulleikar at fylgja við í støddfrøði.
Sama mynstur vísti seg eisini í landsroyndini í 2013. Tað kann tykjast, at fleiri næmingar fáa trupulleikar í støddfrøði í tíðarskeiðinum frá 4. til 6. flokk. Kanska eigur skúlaskipanin at fylgja næmingunum og teirra menning í støddfrøði í miðdeildini. Um tey koma í trupulleikar í støddfrøði tá, fylgir tað teimum mest sannlíkt í framhaldsdeildina.

# Náttúra og tøkni 4. og 6. flokkur

## Uppgávusettini til Landsroyndina 2015

Við svar.fo hava vit fingið fleiri møguleikar at arbeiða fjølbroytt við náttúru/tøkni í mun til pappírsformin, sum nú er farin í søguna. Vit kunnu nú draga alnótina inn sum ein natúrligan part, gera filmsklipp og royndir, har næmingurin aktivt má fara inn at loysa uppgávurnar. Vit hava t.d. møguleika at lurta eftir fuglaljóði, síggja fugl og onnur dýr á lívi og í røttum umhvørvi, eins og vit kunnu fara inn á landakort at kanna ymiskt. Hetta er framtíðin, og umráðandi er, at næmingarnir gerast fimir í at brúka teir miðlar, sum eru til taks. Ein partur verður sostatt at duga at leita seg fram til vitan og at loysa uppgávur.

Hesar lærugreinir ganga natúrligt inn í náttúru/tøkni og eru tengdar saman. Uppgávurnar skulu fevna øll økini.

- Landafrøði
- Alisfrøði
- Evnafrøði
- Lívfrøði

Náttúra/tøkni er sostatt eitt breitt og fjølbroytt øki at fara um, og tí verður nomið við ymiskt í námsætlanini á hvørjum ári.
Árini frammanundan vóru uppgávurnar í pappírsformi. Uppgávurnar í ár eru lagdar tætt upp at fyrrverandi uppgávum, so næmingarnir kenna seg tryggar og kunnu ganga út frá tí, teir kenna.

Lærugreinin náttúra/tøkni hevur 4 ymisk kjarnaøki, sum fyri ein stóran part virka saman í undirvísingini. Hesi øki eru:

- Heimstaðurin
- Heimurin uttan um okkum
- Samspæl menniskjunnar við náttúruna
- Náttúrufrøði

Náttúra/tøkni hevur til endamáls:

- at næmingurin mennir sínar førleikar at eygleiða neyvt og í tí sambandi at nýta mátitól og aðra royndarútgerð, har ímillum teldu, sum ein natúrligan part av undirvísingini
- at næmingurin mennir sínar førleikar at arbeiða við náttúru- og tøknispurningum, bæði verkliga og ástøðiliga
- at næmingurin gerst kunnugur við meginhugtøk og arbeiðshættir og sambandið teirra millum.

*Sí námsætlan fyri "náttúru og tøkni 4-6. fl."  http://www.namsaetlanir.net/nattura_og_toekni*

## Náttúra/tøkni 4. fl.

Í 4. flokki vóru 750 næmingar til landsroynd í Náttúra/tøkni. Í uppgávusettinum vóru 27 spurningar, sum góvu eitt stigatal á 64 stig tilsamans. Royndin gekk fyri tað mesta væl tøkniliga, og næmingarnir skiltu uppgávurnar. Lága ferðin á netinum hjá fleiri skúlum órógvaði til tíðir. Annars vóru afturmeldingarnar góðar.

## Úrslit frá royndini

Miðal úrslitið er 68, og medianin er 68

Talvurnar niðanfyri vísa úrslit frá samløgurásini við samanløgdum týddum hjá næmingunum í náttúra/tøkni í 4. flokki.

Á næstu síðu er samløgurásin við frágreiðingum!

## "NATTURAOGTOKNI4-3"

Næmingar = 750

| Min. | 1st Qu. | Median | Miðal | 3rd Qu. | Max. |
|---|---|---|---|---|---|
| 3.125 | 59.380 | 68.750 | 68.050 | 78.120 | 96.880 |







Hyggja vit eftir kurvini hjá 4. flokki, hava 5% av næmingunum millum 90% og 100% røtt úrslit. Her er vert at leggja merki til, at eingin næmingur fekk alt rætt. 15% av næmingunum hava millum 80% og 90% røtt úrslit.

## Náttúra og tøkni 6. fl.

Í 6. flokki vóru 715 næmingar til landsroynd í Náttúra/tøkni. Í uppgávusettinum vóru 28 spurningar, sum góvu 76 stig tilsamans. Royndin gekk fyri tað mesta væl tøkniliga, og næmingarnir skiltu uppgávurnar. Onkrar uppgávur vóru ikki greinaðar nóg væl, og lága ferðin á netinum hjá fleiri skúlum órógvaði til tíðir. Annars vóru afturmeldingarnar góðar.

## Úrslit frá royndini

Miðal úrslitið er 71 og medianin er 73.

Talvurnar niðanfyri vísa úrslit frá samløgurásini við samanløgdum týddum hjá næmingunum í náttúra/tøkni í 6. flokki.

Á næstu síðu er samløgurásin við frágreiðingum!

## "NATTURAOGTOKNI6-7"

Næmingar = 715

| Min | 1st Qu. | Median | Miðal | 3rd Qu. | Max. |
|---|---|---|---|---|---|
| 0.00 | 63.16 | 73.68 | 71.88 | 82.89 | 100.00 |







Hyggja vit eftir kurvini hjá 6. flokki, so hava 50% av nemingunum 72% rætt, og 10% hava 90% rætt.

# Samanbering millum 4. og 6. flokk

Talvan niðanfyri vísir, hvussu stórur partur av næmingunum, í ávíkavist 4. og 6. flokki, hava fingið millum 90% og 100% rótt úrslit, o.s.fr.

| Næmingaúrslit bólkað eftir úrsliti | 4. flokkur | 6. flokkur |
|---|---|---|
| Millum 90% og 100% rótt úrslit | 5% | 8% |
| millum 80% og 90% rótt úrslit | 15% | 27% |
| millum 60% og 80% rótt úrslit | 50% | 45% |
| millum 0% og 60% rótt úrslit | 30% | 20% |

Út frá talvuni síggja vit, at parturin av næmingum, sum fáa millum 90% og 100% rætt, er á leið tann sami. At parturin av næmingum, ið standa seg sera væl í landsroyndini í náttúra/tøkni, er á leið tann sami í 4. til 6. flokk, kann vera tí, at nakrar uppgávur eru truplar, og bert tey sera dugnaligu standa seg sera væl.

Parturin av næmingum, sum fáa minni enn 60% rætt, er í 4. flokki 30% av næmingunum, meðan í 6. flokki eru tað bert 20% av næmingunum, sum liggja í hesum økinum.

Nú øll hjálpartól eru tøk, er torførari at gera spurningar, tí teir skulu vera úr tilfari, næmingarnir hava lært, og sum tískil kann vera lætt at sláa upp.
Í uppgávuni um sýru og lút hjá 6. flokki fingu næmingarnir møguleika aktivt at taka lut í royndum. Hetta er í tráð við ætlanini um, at náttúra/tøkni skal vera upplivingarfak, har næmingurin sleppur at royna seg.
50% av næmingunum hava 72% rætt, og er tað ein stórur bólkur. Men vísandi til, at øll hjálparamboð eru tøk, er hetta kanska eitt sunt tekin.
Við støði í undanfarnum royndum hava vit sæð, at áhugin og uppmerksemið í náttúru/tøkni er ment, og at støðið er hækkað.

# Samlað niðurstøða av landsroyndini 2015

2015 var árið, har skift var frá uppgávum í pappírsformi til talgildar uppgávur. Hetta er ein stór broyting, og nógv arbeiði og nógvar royndir liggja aftan fyri hetta skiftið. Sum heild var hetta ein sólskins søga. Allar royndirnar vóru framdar til ásettu tíðina. At alt tilfar var teldutøkt, førdi millum annað við sær, at næmingar við skerdum lesiførleika, kundu fáa allar uppgávur og alt tilfar lisið upp, um teir høvdu neyðugu forritini á telduni. Næmingar/foreldur, lærari og skúlaleiðari fingu svarini frá royndini sama dag, royndin var avgreidd. Afturboðanin sama dag var fullfíggjað. Úrslitið hjá hvørjum einstøkum næmingi, umframt floksmiðal og landsmiðal fyri lærugreinina vóru tøk sama dag. Vit halda okkum sostatt til altjóða krøv um gott royndarhald Lærarin í einstøku lærugreinini sær, í hvørjum uppgávuøki næmingarnir eru sterkir, og hvar manglar eru, og neyðugt er at leggja størri dent á undirvísingina framyvir. Men trøini vaksa sjáldan heilt inn í himmalin. Í skipanini er ikki møguligt at síggja hesi viðurskifti á landsplani. Hetta verður atbeitt framímóti til komandi royndir.
Við hesi nýggju skipan hava vit flutt føroyska skúlan inn á ein nýggjan pall. Nú alt tilfarið er talgilt, arbeiðir næmingurin ikki bert við høvdi og penni. Nei, í uppgávunum eru ljóðbrot, videobrot, og næmingarnir gera eisini royndir í einum tykisumhvørvi, har arbeitt verður við kemiskum evnum sum í einari royndarstovu. Við støði í hesum royndum skal næmingurin gera egnar niðurstøður.
Uppgávubólkarnir eiga rós uppiborið fyri, at hetta skiftið frá pappíri til talgilt umhvørvi eydnaðist so væl. Nám hevur eisini við sínum KT-førleikum verið ein dyggur viðspælari, sum

saman við stýrisbólkinum hevur lagt lunnar undir kt-partin, bæði tá talan er um datatrygd og uppbygging av talgilda undirstøðukervinum. Skipanin er nú øll á føroyskari jørð. Allar dátur eru her heima, skipanin er staðsett her og verður hildin við líka og ment av føroyskari arbeiðsmegi. Men uttan uppbakking og jaligan hugburð frá øllum í skúlaverkinum bæði í bygd og bý, hevði hetta ikki eydnast. Samskiftið við telduvørðarnar í skúlunum um landið var mennandi og tryggjaði, at royndirnar vóru væl avgreiddar í øllum krókum av landinum.
Ein tøkk verður tí við hesum borin tykkum nógvu um landið, sum tóku lógvatak, so skiftið frá pappírsroyndum til talgilt umhvørvi eydnaðist so væl.

Tórshavn grundlógardagin 5. juni 2015
Vegna próvstovuna
Óli Jákup Joensen